## DAGSINS MEINING

# Varsemi

Tað er eingin loyna, at føroyingar altíð hava verið skjótir tó at tað eisini eyðkennir okkum, at vit geva okkum góða tíð - verður tað ikki í dag, so verður tað kanska í morgin. Tá vit hava borið eygað við nýggjar vinnumøguleikar hava vit ikki sovið í tímanum.

Nú frálandavinnan bankar á dyrnar eru vit eisini fús at fara til verka og tað beinanvegin, um tað skal vera. Hóast spakin tó ikki meira enn er settur í hoyra og síggja vit javnan fólk siga, at oljan rennur helst longu um 3-4 ár. Tað verður so eisini "brúkt" politiskt. Og bjartskygd oljufólk gera sær líknandi niðurstøður til teirra brúk.

Vit eiga at ansa eftir ikki at selja skinnið fyrr enn bjørnin er skotin. Bæði politikarar og vinnulívsfólk eiga at vera varin við slíkum úttalilsum, tí hesi eru ikki røtt og byggja á gitingar. Tað hevur alla tíðina verið stevnumiðið hjá teimum, sum hava lagt oljutilgongdina til rættis, at vit eiga ikki at leypa framav. Vit eiga at brúka ta tíð hetta tekur. Vit eiga ikki at fyrigykla nøkrum, at hetta tekur stytri tíð enn tað í veruleikanum ger. Tað er óheppið bæði fyri vinnulívið og fyri politisku tilgongdina, um vinnufólk, politikarar og onnur royna at koma við útmeldingum, sum ikki byggja á henda veruleika.

Vit hava sæð, at ávísir politikarar hava roynt at leggja meira í oljuvónirnar enn gott er – fyri at vinna sær politiskar fyrimunir. Tað má tí vera uppgávan hjá øðrum, ið hava kunnleika til eina oljutilgongd at sláa kalt vatn í blóðið og royna at sissa tey, sum síggja fyri sær gull og grønar skógir í kjalarvørrinum á einum oljufundi um bert heilt fá ár.

Førleikamenning av vinnulívi og íløgur í nýggju vinnuna eru kærkomin, men hesi mugu eisini byggja á eina náttúrliga og realistiska gongd. At tosa um føroyskt oljukuwait og føroyskar oljumiljóningar, um at partabrøv í ávísum oljufeløgum skjótt verða gullverd, um at vit skjótt kunnu sleppa blokkinum - tí oljan skjótt rennur - er at villeiða fólkið. Tí vit vita tað rætt og slætt ikki. Boringarnar á Atlantsmótinum seinastu árini eru ikki ov bjartar. Og eitt fyribils fund við týðandi nøgdum av kolvetni á okkara øki er ikki nokk til at byggja hvørki vinnuligar íløgur á ella til at gera politiskar dreymar til veruleika.

Vit sóu, hvussu gekst á Falklandsoyggjunum, tá oljuspor vórðu funnin og róð varð framundir, at nú fór hvør íbúgvi at gerast miljóningur. Í dag er har framvegis eingin olja og miljóningar av teirri orsøk. Føroyingar eiga tí at hava bæði beinini á jørðini, hóast vit fegnir síggja, at ein oljuvinna kann gerast eitt komandi búskaparligt bein at standa á. Tað er tí av stórum týdningi, at politikarar, vinnulívsfólk oo. ikki yvirmeta eina støðu til tess at fáa ein politiskan ella búskaparligan løtuvinning burtur úr.

Latið okkum halda fram við leitingini og latið okkum halda lív í einum orðaskifti her á landi, sum skal beina okkum inn á ta røttu slóðina øllum til frama. Latið okkum hvørki skapa ræðumyndir ella dylja tær. Tí vandi er í hvørjari vælferð, um vit vilja tað ella ikki. Tingini eru sjáldan bara svørt ella hvít. Tí ræður um at síggja og brúka fyrimunirnar og minka um vandarnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Virðing fyri pensjonistunum

**Eyðólv Dimon**
*Hoyvík*



Pensjonistarnir eru eitt tilfeingi í føroyska samfelagnum. Summir pensjonistar eru fólk full av orku, og gerandisdagurin hjá teimum er alt ov stuttur. Ikki ber til at meta týdningin av arbeiðinum hesi gera sum vitjanarvinir, sum ommur og abbar og eisini sum fyriskiparar í pensjonistafeløgum og øðrum felagskapum. Tí eiga myndugleikarnir, og tá kanska serliga kommunurnar, at syrgja fyri, at tað eru góð mentannarlig- og frítíðartilboð til teirra, har teir kunnu luttaka og brúka síni evni.

**Spurningur um virðir og politiska kós**

Men tað eru eisini nógv, sum tá tey gerast gomul, summi fyrr enn onnur, hava tørv á stuðli fyri at klára gerandisdagin. Heimarøktarskipanin er tá ofta tann einasta hjálpandi hondin. Men nógvar eru lagnurnar, har pensjonistarnir verða viðfarnir uttan tað virðing, teir hava uppiborið. Fleiri og fleiri eldri liggja einsamøll og óhjálpin, tá heimahjálpin fer eftir seinastu dagligu vitjanina. Alt meðan henda støðan valdar, er yvirskot í landskassanum, men pengarnir skulu brúkast til onnur dreymakend endamál. Her skal broyting koma í. Nógv kann betrast við øktari játtan til heimarøktina, men hetta er eisini ein spurningur um virðir og politiska kós. Tí tað er ein aðalmunur millum politikkin hjá samgonguni og Javnaðarpolitik.

**Avvarðandi rætt til farloyvi**

Eldrapolitikkur Javnaðarfloksins byggir á nøkur grundleggjandi virðir. Hesi eru

- Virðing fyri tí einstaka pensjonistinum.
- Tign og sómi í eldrarøktini
- Umsorgan fyri teimum veikastu
- Og tryggleiki hjá øllum gomlum.

Tí krevja vit betri tænastur um alt landið, soleiðis at teimum gomlu og óhjálpnu stendur í boði

- Nøktandi heimarøkt alt samdøgrið
- At húsast í sambýlum við neyðugari røkt
- At koma á ellis- og røktarheim, har tað er besta loysnin
- At avvarandi hjá fólki á deyðastrá fáa rætt til farloyvi, fyri at verða um síni nærmastu

Hetta, er ein kollvelting av tí førda eldra politikkinum hjá samgonguni, og tú kanst stuðla hesum politikki við at velja Javnaðarflokkin á komandi løgtingsvalið.

# Yvirtaka fyrst og so diskutera loysingina

**Thomas Arabo**



Ofta verður tosað um loysingarsinnaðir javnaðarmenn mótvegis sambandssinnaðum javnaðarmonnum. Tað er burturvið at tosa soleiðis, tí Javnaðarflokkurin hevur eitt vældefinerað uppskot um Sjálvstýrislóg, sum er ein loysn, ið tryggjar sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

**Millumvegurin**

Tjóðveldismenn vilja altíð síggja markið innanfyri ríkisfelagsskapin sum sambandskt, meðan sambandsmenn vilja altíð tulka fult sjálvbjargni sum ov loysingarkent. Javnaðarflokkurin miðar móti fullum sjálvbjargni í ríkinum. Um fólk ganga og halda, at Javnaðarflokkurin skal taka undir við fullveldisætlanini hjá Tjóðveldisflokkinum, so fara tey skeiv, tí nettup markið við ríkisfelagsskapin er munurin millum hesar flokkar.

**Fullveldi hypotetiskt í dag**

Tað er margháttligt, at Tjóðveldisflokkurin altíð ákærir Javnaðarflokkin fyri at verða sambandskan, tí vit eru so ómetaliga langt frá málinum um sjálvbjargni, ið flestu flokkar kunnu semjast um. Munurin á Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum er, at Javnaðarflokkurin vil verða verandi í ríkinum og Tjóðveldisflokkurin vil útum. Um Tjóðveldisflokkurin ikki var so grammur eftir at staðfesta fullveldi og harvið hevur vent sjálvstýristilgongdina á høvdið, so kundu Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og aðrir flokkar yvirtikið mál fyri mál og arbeitt hóvliga fram móti búskaparligum sjálvbjargni. So kundu føroysku flokkarnir eftir tað tikið slagsmálið um innafyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin, tá fullveldi ikki longur bert er ein hypotetiskur møguleiki.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Neyðugt við skattalætta

### Um ikki kappingarføri skal fúka, er neyðugt við skattalætta

**Marjus Dam**
*Løgtingsmaður*



Hóast lyftir um skattalætta frá Fólkaflokkinum undan seinasta valið, elegant eftir valið var skift út við fullveldi og harav skattaøking og vavgreyt, so er neyðugt at lække skattin. Nú kann ein ikki vænta annað, enn at skattir og avgjøld hækka undir Fólkafloks- og Tjóðveldisleiðslu. Tí tað hevur tað altíð gjørt. Tað er ein søguligur veruleiki. Loysingin kostar nevniliga so nógv, at tað skal ein øðilig skattahækking til. Ein so stór hækking, at teir ikki tora at siga føroyingum tað. Ei heldur tora at halda eina fólkaatkvøðu um loysingina.

**Skattur niður - ella løn nógv upp:**

Føroyingurin kann ikki longur liva við, at progressiviteturin í skattinum ger, at hvør einasta lønarhækking, og gott tað, endar í landskassanum. Grannskoðari hevur rokna út, at príshækkingar, skattir og avgjøld meira enn eta lønarvøksturin upp hjá føroyingum. Tí er reallønin lække seinastu árini.

Tað má tí vera eitt neyðugt krav frá hvørjum einasta føroyingi eins og fakfelagi, at skattatrýstið og avgjaldstrýstið lækkar. Tað er eisini einasti møguleiki fyri, at okkara kappingarføri ikki skal fara fyri bakka. Tí fakfeløgini hava bert ein møguleika at bøta um viðurskiftir hjá teirra limum. Nevniliga við at krevja munandi lønarhækking. Eina so munandi lønarhækking, at tað sum er eftir eftir skatt er á einum støði, sum í grannalondunum. Og um lønarlagið skal sera nógv upp, orsaka av eini alt ov grammari skattainnkrevjing, so verður vinnulívið taparin, og harvið arbeiðarin og skattavaldið.

Tað er tí sera neyðugt, at skattatrýstið lækkar. Á øllum skattastiganum.

Tá tosa verður um, at arbeiðsmegi tørvar mangar staðir í landinum, so orsøkin fyri stóran part drepandi skattatrýstið. Um skattatrýstið lækkaði, so hevði nógv arbeiðsmegi beinanvegin verið tøk. Tí undir núverandi køvandi skattatrýsti er galdandi, at nógv fólk halda seg ov góðan til at arbeiða um kvøldi og næturnar - fyri at kalla onga inntøku - av tí at øll meirinntøkan av eykaarbeiðinum endar í fullveldiskassanum hjá Fólkaflokkinum. Honum, ið lovaði at skatturin skuldi lækkast, undan seinasta vali, men onki gjørdi fyri at halda lyfti, tvørturímóti.

Hvussu leingi skal føroyski veljarin haldast fyri spott av deyminum av valfleski, ið bert var roykur, í angaði væl undan vali.

Um skattalætti skal fremjast, so merkir tað, at skattaprocenti lækkar í verki. Á hesum øki er at kalla onki hent hetta samgonguskeið.

Men teir í Tinganesi hava eisini havt annað at hugsa um. Nakað, ið als ikki merkir skattalætta!

# Viðurskiftini Føroyar og Danmark millum normaliserast!

### Neyðugt, at fara burtur frá øsingini og ístaðin fáa trygg og skilagóð viðurskifti Føroyar og Danmarkar millum - <u>eina samveldisskipan</u>

**Bjarni Djurholm**
*landsstýrismaður*



Nú <u>allir</u> flokkar hava játtað felags yvirlýsingina, sum løgmaður og danski forsætismálaráðharrin 14. januar settu navn undir, eiga vit at taka samanum.

Høvuðssetningarnir í yvirlýsingini vóru:

1)"Regeringen er indstillet på at samarbejde om Landsstyrets ønsker om overtagelser af yderligere sagsområder inden for grundloven og rigsenhedens rammer".
2)"Regeringen og Landsstyret vil efter Landsstyrets ønske indlede forhandlinger om overtagelse af de sagsområder, som hjemmestyreloven ikke giver mulighed for, med henblik på politisk stillingtagen. Regeringen vil på dette grundlag medvirke til at skabe et lovgrundlag for disse sagsområders overtagelse".

Sostatt er semja um at venda processini á høvdið. Raðfylgjan í tilgongdini í ríkisrættarligu viðurskiftunum er ikki longur avgerandi fyri málsetningin.

Samantvinnanin av suvereniteti og skiftistíð er liðað sundur. Nú kann landsstýrið miðja eftir at gera sáttmála, har løgtingið einsamalt hevur heimild at yvirtaka málsøki. Gjaldingin fyri hvørt málsøki sær verður at gjalda av landskassanum so hvørt, sum yvirtikið verður.

Sostatt verður tað gjørligt at skipa ríkisrættarligu viðurskiftini eftir tí leisti, sum løgtingið og í síðsta enda veljarin metir at vera rætt. Ein lagalig og varlig skipan, har eingi óráð verða tikin. Har broytingarnar fara at taka ta tíð tær taka.

Á fundi við landsstýrið, boðaði forsætisráðharrin frá, at burtursæð frá málunum, sum eru karmar um ríkiseindina, so kunnu ikki bert lista A og B-mál verða yvirtikin, men eisini øll mál, sum ikki er nevnd í umrøddu listum. Forsætisráðharrin ásannaði, at heimastýrislógin ikki er tíðarhóskandi karmur í gerandissamskiftinum og í sambandi við møguligar yvirtøkur. Tí mælti hann til at dagføra viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum, so at samsvar verður millum ríkisrættarligu karmarnar og semjuna í yvirlýsingini.

**Nýggir karmar-samveldisskipan**

Við støði í yvirlýsingini (sum øll eru samd um) eiga vit tí at fáa viðurskifti okkara við danir í trygga legu. Tað er avgjørt neyðugt fyri føroyskan politikk, at vit fáa nýggja avtalu, sum einaferð med alla leggur avgerðirnar um støðu okkara í ríkinum til løgtingið og føroyska veljaran. Eina avtalu, sum eisini forðar fyri konfrontatiónspolitikkinum.

Nú høvi býðst, eigur politiski myndugleikin tí skjótast at virka fyri skipan, sum fjøldin av føroyingum tekur undir við. Undirritaði fer tí at skjóta upp, at nýggj samveldisavtala við danir verður skipað eftir hesum meginreglum (samsvarandi felags yvirlýsingini):

**Samveldisskipan**

1. ***Føroyska heimastýrið kann gera av, at øll málsøki, undantikin uttanríkismál, verjumál, ríkisborgararættur og gjaldoyramál, kunnu yvirtakast sum føroysk sermál við teirri fylgju, at heimastýrið tekur uppá seg tær útreiðslur, ið fylgja við teimum.***
2. ***Heimildirnar hjá Landsstýri og Løgtingi í uttanríkismálum verða víðkaðar til at umfata altjóða sáttmálagerðir viðvíkjandi yvirtiknum málum og medavgerðarætti í øllum málum, sum viðvíkja Føroyum.***
3. ***Tekur Føroya fólk avgerð um, at Føroyar verða sjálvstøðugar, koma málsøkini uttanríkismál, verjumál, ríkisborgararættur og gjaldoyramál undir føroyskt málsræði.***
4. ***Danska stjórnin boðar altjóða samfelagnum frá nýggja sáttmálanum.***

Vit mugu koma burtur úr naggatódnini. Nú er stundin komin, har vit í sátt og semju normalisera og fáa trygg, lagalig og skilagóð viðurskifti Føroyar og Danmarkar millum. Løgmaður og forsætismálarráðharrin hava slóðað fyri møguleikanum.

# Landssjúkrahúsið og Barnagarður

**Jónfinn Olsen**
*form. í UfM*

Gleðiligt at hoyra, at landsstýrismaðurin í Almanna- & heilsumálum nú tekur barnagarðin á Landssjúkrahúsinum í álvara. Hetta hendir dagin eftir, at pallborðsfundurin hevði verið í Norðurlandahúsinum, har Miðflokkurin tók hetta mál fram og vísti tað seg, at blíva eitt av høvuðsevnunum á fundinum í seinna hálvleiki. Hetta var júst tað, vit vildu hava, at fólk sóu álvaran í, at barnagarðurin á Landssjúkrahúsinum fer at loysa stóran part av barnaansingartrupulleikunum í høvuðsstaðarøkinum, hann fer eisini at gera tað attraktivari hjá læknum og sjúkrasystrum at koma hendavegin og søkja starv á Landssjúkrahúsinum.

Verður barnagarðurin á Landssjúkrahúsinum veruleiki (sum Miðflokkurin vil arbeiða fyri) fer hetta at lætta trýsti á hinar ansingarstovnarnar, av tí at tey, ið arbeiða á Landssjúkrahúsinum vilja væntandi flyta børn síni á henda barnagarðin, onnur sum so standa á bíðilista sleppa sostatt inn á hinar stovnarnar. Leypa pláss av á barnagarðinum á Landssjúkrahúsinum, hevur verið frammi at børn, ið standa á bíðilista, kunnu fáa møguleika at koma inn á hesi plássini. Hetta saman við ætlandi 20.000.000,00 íløguni fram til 2023 hjá býráðnum skuldu barnaansingartrupulleikin í Havn verið loystur.

Miðflokkurin vil vísa á, at Eirargarðurin skal fáa frið hesum viðvíkjandi og brúkast til tað, Eirargarðurin verður brúktur til í dag. Barnagarðurin skal hava nýggj høli og ikki nakra fyribils loysn.

Til viðmerkingarnar hjá ávísum politikara í bløðunum herfyri, er bert at siga: »halt teg til at arbeiða landspolitiskt so leingi tú ert løgtingsmaður, tí sannlíkt er, at ein trupulleiki er viðvíkjandi Landssjúkra húsinum, og tað er at ongir barnaansingarmøguleikar eru til børnini hjá teimum, ið arbeiða har og trupulleikin er eisini stórur at fáa fólk at koma henda vegin at arbeiða av somu orsøk. Eitt sum eisini kann nevnast er, at nýggj útbúgving fyri kommunulæknar skuldi setast í verk, har møguleiki skuldi verða hjá tveimum at taka hesa útbúgving í Føroyum, men bert ein skal byrja, tí fleiri spurdu seg fyri, men millum annað var tað væntandi barnaansing, ið gjørdi, at fólk settust aftur at koma henda vegin«.

Jú, hetta má sigast at vera ein landstrupulleiki, men er eisini ein trupulleiki fyri Havnar kommunu, av tí at Landssjúkrahúsið er í Havn. Hava borgarar ikki eisini ein rætt, sum búgva í Havn, eins og aðrar borgarar hava ein rætt kring alt landið. Latið okkum standa saman og loysa henda samfelagstrupulleika í felag, so barnafamiljurnar ikki líða av tvørrandi vilja frá politikarunum.

Latið okkum ikki verða so ábyrgdarleys at verristilla heilsu- og sjúkrarøkt her á landi, tí man ikki vil raðfesta/prioritera børnini og familjur teirra. Vælsignaðir veiti hesa íløgu til barnagarðin á Landssjúkrahúsinum sum skjótast.

Miðflokkurin vil arbeiða fyri at tryggja familjuni saman við børnum teirra tær bestu umstøður og góðar uppalingarmøguleikar **kring alt landið.**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin